# Miðlar

Dagfinn Olsen



## Miðlar í málloysi

At ummæla miðlarnar síðstu dagarnar er óivað ikki so lætt, sum tað kanska ljóðar. Tað er sum við spurnarkappingum: tað er lætt at sita og brúka seg undir lurtitólinum í stovuni, men verri er tá á stendur, og ein sjálvur er partur av spælinum.

Skuldi eg svara spurninginum um meg og mínar miðlar, sum ein útvaldur persónur t.d. hvørja viku ger í vikuskiftis Sosialinum, so hevði svarið verið, at Kringvarpið, tær báðar stóru avísirnar, og so ymsir portalar, føroyskir og útlendskir, nøkta mína tíðindaviku. Útboðið er eisini so stórt á netinum, at ein fær vanliga ikki stundir til stórt meira, enn at vitja kendu síðurnar.

Politikkur hevur í stóran mun merkt tíðindini. Kanska í ov stóran mun, tí í mongum førum kundi tykjast, sum vóru miðlafólk á ferð eftir onkrum, sum kortini ikki var har. Og tá kemur bert ein søga burturúr, hóast beinleiðis av staðnum , sum endar við, at meira frættist seinni og bíðast má eftir at vita, hvussu leikur endar.

Eins og mong í mínum aldri, eri eg frá barnsbeini vanur við, at ta løtuna tíðindasendigin í útvarpinum er, verður lurtað, um enn tað er loyvt at røra seg hesa løtuna. Løtan er so at siga sett av til nøkulunda frið og at geva sær stundir at lurta. Kringvarpið er ein høvuðsmiðil í okkara gerandisdegi. Men tíðin, tá útvarpið var tað, ið savnaði familjuna, er farin. Yngru ættarliðini kenna helst lítlar bindingar til Kringvarp Føroya. Hetta er helst partvís ein samfelagsbroyting, sum onki gerst við. Men við øðrum orðum verða lurtarar ikki settir við! Tíðin, tá føroyingar sótu við oyrunum nær lurtitólinum, tá V4 og undirhaldsharkaliðið har var á ferð kring landið við sangi og skemti, er farin. Men hinvegin hoyra vit ikki slíkt longur! Tað, ið kemur longst á hesum stiganum, er kanska Quisturin.

Men rembingarnar í Kringvarpinum seinnu árini tykjast ikki heilt at megna at betra støðuna. Eftir mangar broytingar, neyðugar og óneyðugar, eru tó glottar at hóma í kringvarsskránni, tó tað óivað er langt á mál. Størstu glottarnir eru á dokumentariska økinum, har vit hava sæð og hoyrt góðar sendingar. Somuleiðis við sendingum, ið viðgera ávís evni, og har miðlafólk hava fingið tíð at arbeiða við ávísum evni. Rósast skal, har rós er uppiborið! Men ikki kemst uttanum, at mangar av teim áhugaverdu eru endursendingar, t.d. sendingin um The Beatles.

Men eitt er, ið ikki broytist, kanska serliga í loftmiðlum: føroyska málið. Undantikið tó, at morgunsendingin hevur eina málløtu – sum eg ov sjáldan havi umstøður at hoyra - á 5-10 minuttir einaferð um vikuna. Eg veit at tað ofta verður tikið sum grenj at koma við slíkum, men miðleysi málpolitikkurin er skaðiligur: Tað er hja mongum oyðileggjandi fyri lurtaragleðina, tá t.d. útvarpið støðugt lýsir við skógvaútsølu frá skógvahandlum-tað eitur t.d. skóleistur og skómakari, ikki skógvamakari. At tey t.d. kunnu gleðast um tí løtuna – tá tað er ta løtuna (ta uttan Ð, tí løta er kvennkyn), og at hús har enn brendu í grund, heldur enn brunnu. Dømini er mong. Helst eru tey málkønu so smátt við at fækkast í Kringvarpinum. Ikki at hinir miðlarnir ikki eisini hava málvillur, men alment Kringvarp eigur at ganga á odda, og er enn so mikið í oddinum í mentanarligu og málsligu uppalingini, at her eigur at gerast okkurt. Málsliga málleysu miðlarnir eiga at fáa hjálp, um tað kann betra málsligu dygdina.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar. Næstu ferð skrivar Birgir Kruse.*

# Teir seinastu stongdu

**ROS** Russiski trolarin Ros, sum í næstan tvey ár hevur ligið í Kollafirði, er nú mannleysur. Tveir teir seinastu menninir umborð fóru heim mánadagin við russiska skipinum Atlantic Lady




*Fríggjadagin, Stanislav (t.v) og maskinmaðurin, Igor (uttanst til høgru) av Kollafirði. Maðurin í miðjuni er skiparin á Atlantic Lady. Tá ið teir fóru avstað, stóð Leif Erik Niclasen frá felagsskapinum Hjálpini á bryggjuni og heilsaði teimum farvæl við fýrverki*

Mynd: Leif Erik Niclasen

Randi Jacobsen

Í mai eru tvey ár liðin, síðan ákæruvaldið legði hald á russiska trolaran Ros fyri ólógligan fiskiskap, og síðan hevur Ros ligið við bryggju í Kollafirði.

Ta fyrstu tíðina var øll manningin umbor, men sum frá leið, fór meginparturin av manningini heim, og bara tríggir menn vóru eftir. Teir hava livað av náði frá felagsskapinum Hjálpini.

Í seinastuni hava bara verið tveir menn eftir, og nú mistu teir tolið.

Mánadagin læstu teir fyri seinastu ferð Ros, góvu Árna Dam, umboðsmanni lyklarnar og fóru so umborð á skipið Atlantic Lady, ið játtaði teimum fart heim til Russlands.

Eftir í Kollafirði liggur Ros nú mannleysur.

Hesi bæði árini hevur fútin rinda havnagjald fyri Ros, og fútaembætið vildi helst fingið skipið selt, men enn er einki nýtt at frætta um nakra sølu, sigur Finn Ougaard, varafúti.

### Fund við reiðarafelagið

Í seinastu viku vóru Árni Dam og Karl Erik Reymheim bodnir til Murmansk at hátíðarhaldið hjá stóra reiðarafelagnum, sum umboðar um 100 feløg á sjógvi og landi.

Teir nýttu tá høvi at hava ein fund við Nikitin, stjóra í tí felagnm og við Kazatlin, stjóra í felagnum, sum keypti Norðborg.

Fundurin endaði við, at teir báðir játtaðu at fara at kanna hjá fíggjarstovnunum, hvat gerast kann við Ros.

Árni Dam sigur, at teir fingu at vita, at í Kirkenes í Noregi hava leingi ligið tveir russiskir trolarar, sum norska ákæruvaldið legði hald á. Teir trolararnir vóru í sama standi sum Ros, og endin var, at teir vórðu seldir sum gamalt jarn fyri vánaligan prís.

Annars hava reiðaríini, hvørs skip fiska í russiskum sjógvi boðið sær til at hjálpa til við at fáa Ros úr Føroyum. Reiðaríini eru P/F Enniberg, P/F Vesturvón og JFK Trol.

Reiðararnir boðaðu ákæruvaldinum frá, at tey trý reiðaríini vóru til reiðar at býta sínamillum útreiðslurnar av at gera Ros siglingarkláran, tí ein áhugaður keypari var í Litava.

– Men vit hava einki frætt aftur, sigur Mortan Johannesen.

*randi@sosialurin.fo*

# Eitt neyðarróp

**DÓMUR** Ein 19 ára gomul kvinna fekk í Føroya rætti mánadagin 30 daga treytaleysa fongsulsrevsing fyri falska fráboðan um neyðtøku. Persónligu viðurskiftini gjørdu, at dómurin ikki var harðari

Randi Jacobsen

Tað verður mett sum sera grovt at melda nakran falskt fyri neyðtøku. Bæði tí tað er hart fyri tann, sum ldaður verður, og tí politiið verður sett í gongd við at gera eitt størri arbeiði, ið vísir seg ikki at hava nakað endamál.

Men kortini slapp ein 19 ára gomul við einum linum dómi fyri at hava meldað ein mann falskt fyri neyðtøku.

Politiið arbeiddi í nakrar dagar við málinum, og tað kom so langt sum, at maðurin varð skuldsettur. Men tá ið hann varð avhoyrdur, hingu forkláringarnar ikki saman.

Og tá ið kvinnan fekk at vita, hvat hann hevði sagt, viðgekk hon, at talan var ikki um neyðtøku. Hon hevði meldað neyðtøku í vónini um at fáa loyst aðrar trupulleikar, sum hon hevði. Tað var sostatt eitt neyðarróp, og júrt við atliti til persónligu viðurskifti hennara var dómurin linari, enn hann annars hevði verið.




*Tað er álvarsligt at leggja fólk undir neyðtøku*

Dómurin var 20 daga treytaða fongsulsrevsing við royndartíð í tvey ár. Tað vil siga, at hon skal ikki inn at sita, ger hon einki revsivert næstu tvey árini.

Haraftrat skal hon vera undir eftirliti hjá Kriminalforsorgini í eitt ár.

Tað var í fjør summar, at kvinnan falskt meldaði neyðtøkuna.

*randi@sosialurin.fo*